FJØLRIT

- tryggjar burðardyggu listaringrásina

# Ársfrágreiðing · Mars 2024



Arnbjørn og Símun Petur á ráðstevnu hjá IFRRO í Stockholm í mai 2023.

# FJØLRIT

## - tryggjar burðardyggu listaringrásina

Fjølrit er meginfelag hjá feløgum, sum umboða rættindahavar, tá ið verk, vard av lógini um upphavsrætt, verða nýtt.
Brúk merkir øll endurgeving - ljósriting, avriting, fjølriting, talgilding og onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg við framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniðið verkið er skapt ella er til taks.
Peningurin, sum Fjølrit fær inn, fer útaftur til rættindahavarar, sum eiga verkini. Fjølrit leggur dent á, at nýtt mentanarligt tilfar verður skapað í Føroyum. Hetta nevna vit eina mentanarliga ringrás, ið fær høvundar og listafólk annars at menna føroysku mentanina.

Fjølrit hevur sum felagskapur onki sjálvstøðugt fíggjarligt endamál.

**Limafeløg**
Hesi feløg eru limir í Fjølriti, og tað eru hesar listagreinar, Fjølrit umboðar:

- Rithøvundafelag Føroya
- Føroysk tónaskøld
- Føroysk myndlistafólk
- Føroyskir yrkisfotografar
- Føroysk bókaforløg
- Føroya miðlafólk

**Umboðsráðið**
Hvørt limafelag tilnevnir eitt umboð og eitt varaumboð í umboðsráðið.

Umboðsráðið skal:

- gera av, hvussu Fjølrit skal virka
- velja stjórnina
- hava eftirlit við arbeiði stjórnarinnar
- eftir uppskot frá stjórnin gera reglugerð um handfaring av viðurløgum

**Lóg um upphavsrætt**
Fjølrit hevur loyvi frá Mentamálaráðnum at virka sum rættindafelagskapur, í samsvari við § 40, stk 1 í løgtingslóg um upphavsrætt.

**Stjórnin og daglig umsiting**
Stjórnin er mannað soleiðis:

- Helle Thede Johansen, forfólk
- Niels Jákup Thomsen, skrivari
- Beinir Bergsson, stjórnarlimur

Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, aðalskrivari, og Símun Petur Venned, KT-mennari, taka sær av dagligu umsitingini.
Jónas Tór Næs er knýttur at Fjølriti sum løgfrøðiligur ráðgevi.
Jákup Samuelsen er bókhaldari.
Samband fæst við at senda teldupost til post@fjoelrit.fo ella ringja 23 86 00 ella 23 86 01.

# Ársfrágreiðing

## til aðalfundin hjá Fjølriti 4. apríl 2024

2023 var á fleiri økjum eitt áhugavert ár hjá Fjølriti. Nýggja umsitingin hevur brúkt nógva orku upp á at seta seg inn í arbeiðsuppgávur, mannagongdir, avtalur, lógir og reglur, samstundis sum dagliga virksemið, við inngjaldi og útgjaldi av viðurløgum til rættindahavar fyri brúk av verkum teirra, hevur gingið sína gongd.

Eisini hevur lutfalsliga nógv orka verið brúkt upp á at fyrireika nýggjar avtalur og at endurnýggja tær verandi, alt meðan ein heilt nýggj avbjóðing hevur stungið seg upp, sum nú krevur, at vit eru á varðhaldi: vitlíki. Í slíkum málum er tað gott at kunna samstarva og samskifta tætt við norðurlendsku systurfeløgini, ið sum oftast eru nøkur fet framman fyri øll onnur, tá ið tað snýr seg um at verja upphavsrættindini.

Fjølrit hevur sostatt eitt spennandi ár fyri framman, har tað verður heilt avgerandi neyðugt, at felagið er sterkt, so at tað framhaldandi megnar at verja rættindini hjá sínum limum.

**Umsitingin í 2023**
Umsitingin hjá Fjølriti var óboytt í 2023. Arnbjørn Ó. Dalsgarð, aðalskrivari í hálva tíð, og Símun Petur Venned, KT-mennari í fulla tíð, hava dagliga raksturin um hendi. Báðir vórðu settir í starv í 2022, Arnbjørn í februar, Símun Petur í desember.

Umframt at seta seg inn í arbeiðsuppgávurnar og virksemið hjá Fjølriti, tóku teir báðir eitt masterskeið í upphavsrætti á Fróðskaparsetri Føroya heystið 2023[1] . Skeiðið hevur styrkt umsitingina og harvið felagið til at skilja og takkla upphavsrættarlig mál. Eisini hava teir luttikið á fundum og ráðstevnum uttanlands, onkuntíð saman, onkuntíð hvør sær, og onkuntíð saman við einum ella fleiri stjórnarlimum.

Umframt teir báðar, er Jákup Samuelsen knýttur at felagnum sum bókhaldari, og Jónas Tór Næs frá Faroe Law er knýttur at felagnum sum løgfrøðingur. Fjølrit og Faroe Law gjørdu í 2023 avtalu um løgfrøðiliga ráðgeving.

**Avtalur**
Eingin nýggj avtala um at nýta vard verk bleiv undirskrivað í farna árið, men tað eru væntandi fleiri avtalur á veg í 2024.

Kommunurnar. Avtalurnar við Kommunum skulu endurnýggjast. Roynt varð at gera eina felags avtalu við Kommunufelagið, heldur enn við hvørja einstaka kommunu, við tí endamáli at spara tíð og orku hjá øllum pørtunum. Eisini ynsktu vit at hækka upphæddina fyri hvønn næming, sum rindast skal, við grundarlag í inflatión, men ikki minst vísandi til ta nógvu arbeiðsorkuna, vit noyðast at brúka, fyri at fáa bara eitt sindur av upplýsingum um nýtslu í fólkaskúlunum – upplýsingar, sum tey í veruleikanum áttu at veitt okkum. Fundur var við Kommunufelagið 27. apríl 2023. Á fundinum kom fram, at ein felags avtala neyvan kemur upp á tal, men møguleiki er fyri at orða ein standardsáttmála, sum hvør einstøk kommuna kann undirskriva. Semja var tó um at strika útgongudagin, sum var í gomlu avtaluni. Í Danmark er upphæddin fyri hvønn næming góðar 250 kr., og umfatar tá einans fólkaskúlan. Okkara upphædd er í løtuni 200 kr. fyri hvønn næming, tað vil siga væl lægri enn í Danmark, og umfatar allar kommunalar stovnar umframt fólkaskúlan. Felagið legði tí út við 350 kr. fyri hvønn næming. Afturat hesum varð tosað um møguleikan at knýta § 16 upp í avtaluna, sum fatar um musealar stovnar, herundir bókasøvn. Í heyst svaraði Kommunufelagið okkum, at tey ynskja, at ein samráðing um ein nýggjan sáttmála eigur at fara fram í einum samskifti, sum Undirvísingastýrið eisini er partur av. Vit hava biðið um fund partarnir ímillum.

Kringvarp Føroya. Avtalan við Kringvarp Føroya skal helst endurskoðast og tillagast til núverandi tørvin. KvF ynskir at kunna senda bert ein part av einum skaldsøgu, men so leggja alla skaldsøguna út, so at fólk sjálv kunnu hoyra rest á heimasíðuni[3] . Okkara niðurstøða er, at hetta ber væl til, men at tað sjálvandi skal rindast viðurlag fyri allar partar, hóast bara nakrir verða sendir í útvarpinum. Tey ynskja eisini at kunna

# FJØLRIT

leggja søgur til børn og ung út á nýggju appina VIT.

SamRit. Fjølrit hevur havt fundir við SamRit um møguleikan at leggja út sangtekstir og nótar á netið, men enn eru ov nógv ivamál til, at ein avtala kann gerast.

Ljóðbøkur. Nógvir fundir hava verið millum Fjølrit og Ljóðbókatænastuna, Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, umframt við løgfrøðing, fyri at royna at finna eina semju um ein sáttmála viðvíkjandi útgávu av ljóðbókum á eReolen og til at selja. Sambært § 17, stk. 3 í upphavsrættarlógini og § 23, stk. 3 í nýggju bókasavnslógini, hevur Ljóðbókatænastan loyvi til at framleiða og bjóða út/selja ljóðbøkur til fólk við lesitarni, men ein avbjóðing er, at tað ikki ber til hjá teimum at avmarka, hvørki hvørji hava lesitarn og ei heldur til hvørji, ljóðbøkurnar verða bjóðaðar út til. Eisini hevur kjak verið um, hvørt Ljóðbókatænastan skal/kann leggja ljóðbøkurnar út, ella um forløgini skulu/vilja gera tað. Viðurlag má eisini rindast fyri tær ljóðbøkur, sum longu eru framleiddar. Støðan við árslok var, at ongin ítøkilig avtala fyrilá, men at partarnir skuldu hittast aftur skjótast til bar, so at ein avtala kundi fáast í lag.

Víðarisøla av listaverkum. Upp-havsrættarfólk eiga ein %-part, tá ið listaverk verða víðaraseld, sambært § 31 í lógini um upp-havsrætt (fylgirættarviðurlag). Avtala kann gerast við felagsskap sum Fjølrit. Jónas Tór Næs hevur kannað ymiskar møguleikar fyri, hvussu hetta letur seg gera. Hann bjóðar sær til at gera uppskot til eitt standardskriv til gallarí og listasøvn, fyri at vita, um tey eru vitandi um hetta, og um tey gera eftir lógini.

Les annars meira um arbeiðið við nýggjum avtalum undir “Ætlanir í 2024”.

**Politikkur og lógarverk**

Mentamál og undirvísingarmál, sum fyrr lógu í einum og sama ráði, Mentamálaráðnum, vórðu býtt út á tvey ráð, tá seinasta samgonga varð skipað. Tað merkir, at okkara loyvi at virka, sum er eitt mentamál, skal veitast av Almanna- og mentamálaráðnum (AMMR), meðan avtalur um nýtslu av upphavsrættarvardum tilfari skal gerast við Barna- og undirvísinga-máðaráðnum (BUMR).

2. februar 2023 vóru vit á fundi við Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu í AMMR, um uppskotið til nýggja bókasavnslóg. Har mótmæltu vit teirra ætlan um at broyta bókasavnsgjaldið frá at vera eitt upphavsrættargjald/viðurlag til at verða burturav mentanarstuðul. Endamálið hjá myndugleikunum var, at við hesi broyting kundu tey seta inn í lógina, at gjaldið framyvir ikki skuldi kunna fara í arv, men sum vit gjørdu vart við, vildi broytingin eisini havt skattliga neiliga ávirkan, samstundis sum gjaldið eftir okkara tykki ikki einans er eitt slag av stuðli, men ein rættur fyri mista inntøku.

14. apríl 2023 vóru vit á fundi við Barna- og undirvísingarmálaráðið, BUMR, har vit millum annað kunnaðu um, at vit mugu gera nýggja avtalu um nýtslu í miðnámi og hægri útbúgving, tí at tað økið nú er flutt úr MMR til BUMR. Vit umhugsa eisini at hækka gjaldið, av tí at tað upprunaliga var ásett á tí grundarlagi, at vit skuldu fáa upplýsingar um nýtslu frá UMMR ella skúlunum – soleiðis sum tað eisini er tilskilað í avtaluni. Tað er ikki hent, og tað hevur havt við sær, at vit hava nýtt alt ov stóran part av peninginum til umsiting fyri at fáa fatur á hesum. Hetta førdi so til næsta punktið, sum var eina áheitan til BUMR og Undirvísingarstýrið um at fáa í lag eina talgilda skipan, sum kann gera tað smidligari, bæði hjá lærarunum, men ikki minst fyri okkara starvsfólk. Har varð nógv kjak um møguleikar, forðingar o.s.fr., og inn ímillum fór kjakið av sporinum, men samanumtikið varð niðurstøðan, at Hjalmar Hansen vildi kalla til fund í Undirvísingarstýrinum fyri at umrøða, hvat ið okkum tørvar, og hvussu hetta møguliga kann loysast í samstarvi.

20. apríl 2023 var umboð fyri Fjølrit á fundi við Sirið Stenberg, landsstýriskvinnu, AMMR.

# FJØLRIT

Endamálið var at heilsa uppá og at tosa um okkara virkisøki sum heild. Eisini varð tosað um, hvørt upphavsrættarlógin eigur at vera endurskoðað. Serliga við atliti til DSM (Digital Single Market), sum er eitt ES-regluverk frá 2019, sum skal tryggja, at rættindahavar fáa viðurlag fyri talgilda brúkið á netinum, sum gongur yvir um landamørk. AMMR vísti áhuga fyri hesum, og tey søgdu, at Fjølrit sjálvandi skal vera við í arbeiðinum at dagføra føroysku lógina.

Í framhaldi av fundinum við BUMR í apríl, varð Fjølrit boðið til fund við Undirvísingarstýrið hósdagin 25. mai kl. 13.00. Endamálið var at umrøða, hvat ið felagnum tørvar, og hvussu hetta møguliga kann loysast í samstarvi við Undirvísingarstýrið. Onki ítøkiligt spurdist tó burturúr hesum fundinum.

Felagið hevur sent viðmerkingar til uppskot um samtyktar um at fáa UNESCO-sáttmálan um at verja og fremja margfeldið í mentanarligum framburði frá 2005 settan í gildið í Føroyum. Fjølrit tekur undir við seta uppskotið í gildi við hesum viðmerkingum: Vit ynskja tó at gera vart við, at tað eisini er sera umráðandi, at umsitingin, sum stendst av hesum, ikki kemur at ganga út yvir tær játtanir, sum eru til listafólk og ei heldur kemur at leggja eyka arbeiðsorku á listafólk ella feløg, uttan at endurgjald/løn fylgir við.

**Innkomin peningur**
Avtalan við Uttanríkis- og mentamálaráðið fevndi í 2023 um teir somu 10 stovnarnar sambært fíggjarlógini, og allar rokningarnar vóru rindaðar stundisliga. Inn komu kr. 1.039.224,55. Hetta er ein hækking í mun til árið fyri.

Rokningar vóru sendar kommununum, við avtalu fyri skúlaárið 2022/23 á kr. 1.450.200,00. Talan er um 7275 fólkaskúlanæmingar á kr. 200. Rokningarnar eru avgreiddar.

Uppgerð frá Kringvarpinum verður latin ársfjórðingin afturút, og inngjaldingarnar í 2023 fevna sostatt um 4. ársfjórðing 2022 og 1., 2. og 3. ársfjórðing í 2023. Inn komu kr. 313.737,86.

**Skrásettir rættindahavarar**
Í 2023 skrásettu 60 nýggir rættindahavar seg hjá Fjølrit. Sostatt eru nú tilsamans 289 skrásettir rættindahavarar. Av hesum eru 25 feløg. Allir skrásettu rættindahavarnir eru føddir fyri ár 2000.

**Útgjald**
Eftir avtaluni við Kringvarp Føroya, vórðu í 2023 settar av kr. 285.216,21 til útgjald. Av hesum vórðu kr. 207.992,63 goldnar út eftir skrásettari nýtslu til 24 rættindahavarar. Goldið verður út fýra ferðir árliga, og tá rættindahavari skrásetur seg.

Eftir avtaluni við kommunurnar vórðu í 2023 settar av kr. 1.009.241,92 til útgjald, fyri nýtslu í skúlaárinum 19/20. Fjórðingurin; 252.310,48 kr. varð settur av til individuelt útgjald, og restin varð goldið út eftir fráboðan, 756.931,44 kr. 106

**Innkomin peningur í 2023**

| | Mentamálaráðið | kommunurnar | Kringvarpið | Barnabati |
|---|---|---|---|---|
| 2014 | 200.000 | | | |
| 2015 | 200.000 | | | |
| 2016 | 200.000 | | | |
| 2017 | 133.333 | | | |
| 2018 | 1.026.856,95 | | 412.220 | |
| 2019 | 954.258,45 | 1.321.000,00 | 258.892,44 | |
| 2020 | 971.695,55 | 1.373.600,00 | 441.668,33 | 325 |
| 2021 | 1.063.425,7 | 1.396.200,00 | 414.093,63 | 150 |
| 2022 | 900.987,80 | 1.436.800,00 | 268.702,61 | 0 |
| 2023 | 1.039.224,55 | 1.450.200,00 | 313.737,86 | 0 |

*KVF 2019 er fyri 3 ársfjórðingar

# FJØLRIT

fráboðanir vóru, og bleiv upphæddin fyri hvørja 7.140,86 kr. Av teimum 252.310,48 kr. til individuelt útgjald bleiv býtið 68% til føroyskar rættindahavar og 32% til útlendskar, svarandi til 171.495,43 kr. til teir føroysku og 80.815,05 kr. til teir útlendsku. Av partinum til føroyskir rættindahavar vóru 34.675,52 kr. útgoldnar til 8 rættindahavar.

Eftir avtaluni við Mentamálaráðið vórðu í 2023 kr. 768.696,31 kr. settar av til útgjald, fyri nýtslu í skúlaárinum 19/20. Helvtin, 384.348,15 kr. vóru settar av til individuelt útgjald, meðan hin helvtin var útgoldin eftir fráboðan. Í tí individuella vóru góð 40% føroyskir rættindahavar, og bleiv hetta til kr. 155.502,59 kr. Restin; 228.845,56 kr. vóru settar av til útlendskar rættindahavar.

159 góðkendar fráboðanir vóru, og upphæddin fyri hvørja varð sostatt 2.432,58 kr.

Sambært lóg um upphavsrætt § 43, fyrnar viðurlag fyri nýtslu av vardum verkum 3 ár frá ársenda av tí árinum, tá ið verkið varð nýtt. Ger rættindahavari ikki vart við seg innan hesa freist, ger Fjølrit sum góðkendur felagsskpur av, hvussu hesi viðurløg skulu nýtast. 31. desember 2023 fyrndust kr. 929.801,88, sum hava staðið avsettar til rættindahavarar fyri nýtslu fyri 31. desember 2020. Av hesum vóru 698.823,19 kr. avsettar til útlendskar rættindahavar.

Í 2021 og 2022 fyrndust viðurløg fyri tilsamans kr. 916.296,92, og stjórnin avgjørdi at brúka kr. 200.000,00 til tvey ymisk endamál: 1) Stuðul til verkætlan hjá Føroyar Lesa og Rithøvundafelagnum at fáa fleiri rithøvundar út á skúlarnar, og 2). Løgfrøðiliga ráðgeving í sambandi við gerð av nýggjum avtalum. Umboðsráðið hevur síðan viðgjørt, hvussu restin av fyrndu pengunum skulu býtast út, og mælir til, at pengarnir fyrst og fremst verða býttir út gjøgnum pulju eftir fráboðan, eftir §3 í reglugerðini um handfaring av viðurløgum.

**Fyrispurningar um upphavsrætt**
Fjølrit fær javnan fyrispurningar um nýtslu av upphavsrættarvardum tilfar.

Í einum føri varð ein fotomynd avritað sum málningur. Okkara sakførari, Jónas Tór Næs, mælti til, at vit ráddu fólki til at venda sær til sakførara í slíkum føri, og annars orðaði hann eitt skriv, sum vit framyvir kunnu nýta, um vit fáa fleiri tílíkar fyrispurningar.

Tað er ikki altíð líkatil at taka støðu til, nær talan er um nýtslu ella einans íblástur, og ei heldur, um talan er um nýtslu, og hvussu stór upphædd krevjast kann sum viðurlag. Hetta er eitt øki fyri løgfrøðingar og ikki mál fyri Fjølrit at taka sær av.

**Fundir og ráðstevnur uttanlands**
CEO-fundur hjá norðurlendsku rættindahavafelagsskapunum varð hildin í Keypmannahavn 29. mars 2023. Arnbjørn luttók.

Norðurlendskur statistikkfundur varð hildin í Keypmannahavn frá 11-12. mai 2023. Símun Petur og Arnbjørn luttóku.

Ársfundur og -ráðstevna hjá europeisku deildini av altjóða rættindahavafelagsskapinum IFRRO varð hildin í Stockholm frá 29-31. mai 2023. Arnbjørn og Símun Petur luttóku.

Norðurlendskur stórfundurin, sum er ársfundurin hjá norðurlendsku rættindahavafelagsskapunum, varð hildin í Helsinki frá 13-14. juni 2023. Helle, Niels Jákup, Arnbjørn og Símun Petur luttóku.

Ársfundur og -ráðstevna hjá altjóða rættindahavafelagsskapinum IFRRO varð hildin í Reykjavík frá 2-5. oktober 2023. Arnbjørn og Beinir luttóku.

**Umboðsráðið og stjórnin**
Aðalfundurin varð hildin týsdagin 21. februar 2023. Steintór Rasmussen stillaði ikki upp aftur,

# FJØLRIT

men einki valevni var, og tí játtaði hann at halda fram, til nýtt umboð varð funnið.

Stjórnin skipaði seg á stjórnarfundi 21. februar. 2023 við Helle T. Johansen sum forfólki og kassameistara, Niels J. Thomsen sum skrivara, og Steintóri Rasmussen sum nevndarlimi. Á stjórnarfundi 17. mai 2023 bar Steintór Rasmussen fram ynski um at sleppa úr stjórnini. Hetta varð tikin til eftirtektar, og tiltaksfólkini vórðu spurd. Úrslitið varð, at Beinir Bergsson kom í hansara stað. Í august yvirtók Beinir sessin sum kassameistari.

Umboðsráðsfundur varð hildin 19. september 2023, har kunnað varð um virksemið. Til viðgerðar vóru eisini uppskot um, hvussu fyrndir pengar skulu rindast út, og uppskot um broytingar í reglunum fyri útgjald gjøgnum puljur.

**Reglur og mannagongdir**
Felagið hevur í 2023 gjøgnumgingið og dagført bæði mannagongdir og reglugerðir, og nakrar broytingar eru gjørdar.

Reglan um minsta mark fyri útgjald á 300 kr. er tikin burtur, av tí at tað umsitingarliga er lættari at lata peningin fara út enn at halda honum aftur.

Eitt hægstamark er ásett fyri, hvussu nógvar fráboðanir hvør persónur/felag kann senda inn til hvørja pulju, sum lýst verður við.

**Tiltøk**
Fjølrit luttók aftur á árligu læraradøgunum í Norðurlandahúsinum, sum Nám skipar fyri frá 7-9. november 2023. Arnbjørn, Símun Petur og Helle mannaðu ein bás, har lærarar kundu koma á tal við felagið.

Árligu bókadagarnir vórðu hildnir í Norðurlandahúsinum frá 17-19. november 2023. Fjølrit luttók aftur við einum bási, sum hesa ferð var partur av básinum hjá Rithøvundafelag Føroya og Føroyar Lesa.

**Ætlanir í 2024**

**Avtalur**
Loyvið hjá Fjølrit at virka sum rættindahavafelagsskapur gongur út 31. mars 2024, og tí verður neyðugt at endurnýggja tað.

Avtalan við MMR skal endurskoðast, og/ella nýggj avtala skal gerast við BUMR, sum nú umsitur alla undirvísing, hægri enn fólkaskúlan. Allar avtalurnar við kommunurnar skulu endurnýggjast og dagførast.

Avtalan við Kringvarp Føroya verður dagførd, so at KvF kann brúka tilfarið í appini VIT og leggja út tilfar á heimasíðuna lættari enn nú.

Miðað verður eftir at fáa avtalur við Fólkakirkjuna, listasøvn, landssøvn, Máltøknidepilin á Fróðskparsetrinum, almennu fyrisitingina og aðrar almennar og privatar stovnar, sum brúka vard verk í sínum virksemi.

**Umsitingin**
Stjórn og starvsfólk hava avgjørt at skipa fundirnar øðrvísi komandi árið, 2024. Hetta fyri at leysgeva meira orku til starvsfólkini. Frameftir hevur stjórnin einans fund annan hvønn mánað – ella oftari, um tørvur er fyri tí. Hinar mánaðarnir hevur forkvinnan starvsfundir við starvsfólkini, og hevur hon annars javnan samband við teir. Tað er framyvir eisini forkvinnan, sum tekur sær av at seta skránna upp til fundirnar. Skrivað verður fundarfrásøgn, bæði frá stjórnarfundum og starvsfundunum.

**Kanningar og hagtøl fyri nýtslu**
Arbeitt verður á ymsan hátt við at bøta um hagtalsgrundarlagið til at rinda út eftir. Samstarv er sett í gongd við Fróðskaparsetur Føroya um at veita betri nýtsluhagtøl, og ætlanin er at broyta kanningarháttin, sum brúktur hevur verið úti á fólkaskúlunum seinastu árini, fyri at fáa fleiri lærarar at taka lut í nýtslukanningunum og skráseta nýtsluna neyvari. Eisini er Fjølrit í samskifti við Undirvísingarstýrið at fáa tey at

# FJØLRIT

stuðla undir royndirnar at fáa betri hagtøl til vega.

**Fundir og ráðstevnur uttanlands í 2024**

- Norðurlendskur kommunikatiónsfundur verður í Helsinki 10-11. apríl 2024
- Norðurlendskur statistikkfundur verður í Helsinki 24-25. apríl 2024
- IFRRO mid-year verður í Valencia, Spania 27-29. mai 2024
- Norðurlendskur stórfundur verður í Keypmannahavn 12-14. juni 2024
- IFRRO ársfundur verður í Quebec, Kanada 30. september-3. oktober 2024

Umframt hesar eru eisini netfundir og webinar gjøgnum árið.

# Grannskoðan

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

**Fjølrit**

**Postsmoga, 62, 110 Tórshavn**

**Ársfrásøgn**

**2023**

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann 4. april 2024.

Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit

| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Leiðslufrágreiðing** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| Leiðslufrágreiðing | 6 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. december 2023** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 7 |
| Rakstrarroknskapur | 8 |
| Fíggjarstøða | 9 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Stjórnin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2023 hjá Fjølrit.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við føroyska lóggávu og viðtøkur fyri felagið.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. december 2023 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. december 2023.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur, eftir okkara fatan, eina rættvísandi frágreiðing um tey viðurskifti, sum frágreiðingin umrøður.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 28. februar 2024

**Stjórn**

| | | |
|---|---|---|
| Helle Thede Johansen<br>forkvinna | Niels Jákup Thomsen<br>skrivari | Beinir Bergsson<br>kassameistari |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til leiðsluna í Fjølrit**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Fjølrit fyri roknskaparárið 1. januar - 31. december 2023 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur sambært galdandni lóggávu og viðtøkum hjá Fjølrit.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. december 2023 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskaparárinum 1. januar - 31. december 2023 samsvarandi galdandi lóggávu og viðtøkum Fjølrits.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við ársroknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**
Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga váttan við vissu um leiðslufrágreiðingina.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa um kravdu upplýsingarnar eftir galdandi lóggávu og viðtøkur felagsins eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd í samsvari við ásetingarnar í galdandi lóggávu og viðtøkur felagsins. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivleikar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 28. februar 2024

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

## Upplýsingar um felagið

| | | |
|---|---|---|
| **Felagið** | Fjølrit<br>Postsmoga 62<br>110 Tórshavn | |
| | Heimasíða: | www.fjoelrit.fo |
| | V-tal: | 429198 |
| | Roknskaparár: | 1. januar - 31. december |
| **Stjórn** | Helle Thede Johansen, forkvinna<br>Niels Jákup Thomsen, skrivari<br>Beinir Bergsson, kassameistari | |
| **Grannskoðan** | **P/F Januar, løggilt grannskoðanarvirki**<br>Óðinshædd 13, Postbox 30, FO-110 Tórshavn<br>Telefon: 31 47 00 - Telefaks: 35 17 01<br>Teldupostur: januar@januar.fo<br>Heimasíða: www.januar.fo | |

## Leiðslufrágreiðing

**Virksemi**

Virksemi Fjølritar er at gera sáttmálar við brúkarar um viðurlag fyri brúk av teimum sløgum av verkum, sum limir limafelaganna skapa; at krevja inn og býta út viðurløg, at fáa til vegar upplýsingar til at styrkja grundarlagið undir viðurlagskrøvum mest møguligt; at veita feløgum hjá útlendskum rættindahavarum viðurløg fyri brúk av teirra verkum í Føroyum og frá hesum at taka ímóti viðurløgum fyri brúk av føroyskum verkum uttanlands, og støðugt at upplýsa brúkarar og rættindahavarar um møguleikar og rættindi teirra.

Fjølrit er góðkendur felagsskapur sambært § 40, stk. 1 í løgtingslóg nr. 30 fra 30. apríl 2015 um upphavsrætt (hereftir nevnd upphavsrættarlógin) og umboðar rættindahavarar í sambandi við øll sløg av endurgeving, ljósriting, avriting, fjølriting ella onnur margfalding av vardum verkum, tað veri seg í framførslu, útgávu ella framleiðslu, sama hvar, hvussu ella í hvørjum sniði verkið er/verður skapt ella er til taks.

Í løtuni eru hesi feløgini limir í Fjølrit: Rithøvundafelag Føroya, Felagið Føroysk Tónaskøld, Føroyskir Yrkisfotografar, Føroysk Bókaforløg, Føroysk Miðlafólk og Føroysk Myndlistafólk. Í avtaluhøpi umboðar Fjølrit allar rættindahavarar innan hesi øki.

Fjølrit hevur sum felagsskapur einki fíggjarligt endamál.

## Nýttur roknskaparháttur

Ársfrásøgnin fyri Fjølrit er gjørd í samsvari við ásetingarnar í ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki B.

Ársfrásøgnin er gjørd eftir sama roknskaparhátti sum undanfarna ár og verður gjørd í donskum krónum (DKK).

Upphæddir í rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum v.m. verða avrundaðar til heil tøl, og samanberingartøl undanfarna ár verða avrundað til heil túsund. Av tí, at tølini verða avrundað hvørt fyri seg, kunnu avrundingarmunir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølunum.

### Rakstrarroknskapurin

**Nettoinntøka**

Nettoinntøka umfatar viðurløg fyri nýtslu av upphavsrættarliga vardum verkum.

**Útgoldin viðurløg**

Útgoldin viðurløg umfatar útgoldin viðurløg til rættindahavara at verkunum.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til sølu, marknaðarføring, fyrisiting, hølir og tap av áognarum.

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**

Fíggjarligir postar umfata rentur. Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

### Fíggjarstøðan

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

**Skuld**

Onnur skuld verður tikin við til amortiseraða útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. december

| Nota | | 2023 kr. | 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | Nettoinntøka | 2.803.165 | 2.606 |
| | Útgoldin viðurløg | -1.553.261 | -1.009 |
| | Aðrir uttanhýsis kostnaðir | -270.353 | -210 |
| | **Bruttoúrslit** | **979.551** | **1.387** |
| 1 | Starvsfólkakostnaðir | -827.511 | -675 |
| 2 | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 0 | -26 |
| | **Ársúrslit** | **152.040** | **686** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| Flytast til flutt úrslit | 152.040 | 686 |
| **Býtt tilsamans** | **152.040** | **686** |

## Fíggjarstøða 31. december

**OGN**

| Nota | | 2023 kr. | 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Ogn í umferð** | | |
| 3 | Áogn | 20.053 | 11 |
| | Áogn tilsamans | 20.053 | 11 |
| | Tøkur peningur | 5.869.940 | 5.697 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **5.889.993** | **5.708** |
| | **OGN TILSAMANS** | **5.889.993** | **5.708** |

**SKYLDUR**

| Nota | | 2023 kr. | 2022 t.kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 4 | Flutt úrslit | 5.850.355 | 5.698 |
| | **Eginogn tilsamans** | **5.850.355** | **5.698** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 26.400 | 0 |
| | Onnur skuld | 13.238 | 10 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 39.638 | 10 |
| | **Skuld tilsamans** | **39.638** | **10** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **5.889.993** | **5.708** |

## Notur

| | | 2023<br>kr. | 2022<br>t.kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Starvsfólkakostnaðir** | | |
| | Lønir | 687.955 | 607 |
| | Eftirlønir | 104.202 | 41 |
| | Onnur almenn gjøld | 35.354 | 27 |
| | | **827.511** | **675** |
| | Nevnd | 38.613 | 28 |
| **2.** | **Aðrir fíggjarligir kostnaðir** | | |
| | Aðrir fíggjarligir kostnaðir | 0 | 26 |
| | | **0** | **26** |
| **3.** | **Áogn** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 20.053 | 11 |
| | | **20.053** | **11** |
| **4.** | **Flutt úrslit** | | |
| | Flutt úrslit primo | 5.698.315 | 5.036 |
| | Flutt úrslit í árinum | 152.040 | 686 |
| | Rætting flutt úrslit 2021 | 0 | -24 |
| | | **5.850.355** | **5.698** |

# Ársroknskapur 2023

| Nr. | RAKSTRARROKNSKAPUR | Tíðarskeiðið | Árið fyri |
|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | |
| 1040 | Inntøka sambært avtalu MMR | -1.039.224,55 | -900.987,80 |
| 1041 | Inntøka sambært avtalu Kommunar | -1.450.200,00 | -1.436.800,00 |
| 1042 | Inntøka sambært avtalu Kvf | -313.737,86 | -268.702,61 |
| 1043 | Inntøka frá stovnum | 0,00 | 0,00 |
| | **Inntøkur íalt** | **-2.803.162,41** | **-2.606.490,41** |
| | | | |
| | **Umsitingarútreiðslur** | | |
| 2210 | Lønir | 742.407,50 | 606.902,54 |
| 2211 | Frítíðalønir | 11.136,23 | 13.160,37 |
| 2213 | Nevndarsamsýning | 38.613,12 | 28.379,52 |
| 2222 | ArbeiðsMarknaðarEftirlønarGrunnurin | 21.449,00 | 17.791,00 |
| 2223 | Arbeiðsloysisskipanin | 6.794,00 | 3.677,00 |
| 2224 | Barsilsgrunnurin | 6.846,00 | 5.674,00 |
| 2230 | KM-peningur | 264,96 | 0,00 |
| 2241 | Starvsfólkakostn./útbúgv. vm | 22.152,18 | 441,41 |
| 2750 | Matstovu/umboðan | 3.147,50 | 9.007,65 |
| 2754 | Gávur og blómar | 2.097,95 | 2.250,00 |
| 2770 | Ferðing og umboðan | 100.334,10 | 65.127,52 |
| 2800 | Kunning, marknaðarføring & rættlestur | 8.787,50 | 15.839,70 |
| 2811 | Tiltøk | 0,00 | 0,00 |
| 3411 | Húsaleiga | 13.026,60 | 12.960,33 |
| 3600 | Skrivstovu útr. pappír vm | 3.385,00 | 3.305,90 |
| 3604 | Edv og skipanir | 19.278,74 | 16.842,88 |
| 3617 | Smærri innkeyp (teldu, printari vm) | 7.647,80 | 26.336,11 |
| 3620 | Telefon | 6.404,75 | 3.575,35 |
| 3628 | Bankakostnaðir | 2.543,00 | 2.085,98 |
| 3640 | Grannskoðari | 10.000,00 | 7.500,00 |
| 3645 | Advokatur | 37.187,50 | 12.500,00 |
| 3647 | Bókhald | 26.400,00 | 25.920,00 |
| 3661 | Yrkisbókmentir | 1.638,00 | 0,00 |
| 3663 | Limagjald IFRRO | 6.319,74 | 6.296,14 |
| 3664 | Web-hotel og domæni | 0,00 | 0,00 |
| 3720 | Tap av skuldarum | 0,00 | 0,00 |
| 4410 | Rentuútreiðslur, banki | 0,00 | 25.802,10 |
| | **Útreiðslur samantalt** | **1.097.861,17** | **911.375,50** |
| | | | |
| | Rakstrarúrslit | -1.705.301,24 | -1.695.114,91 |
| | | | |
| | Umsitingarpartur í % | 39,17 | 34,97 |

viðmerkingar

Konto 2210: hækkingin stavar frá lønarhækkingum í nýggju avtaluni millum AKF og Fíggjarmálaráðið, og frá øktum fundarvirksemi, mest í sambandi við gerð av nýggjum avtalum

Konto 2241: hetta eru millum annað útreiðslur fyri Masterskeið í upphavsrætti, sum aðalskrivarin og KT-mennarin tóku á Fróðskaparsetrinum heystið 2023

Konto 3645: arbeitt verður við at gera fleiri nýggjar avtalur, og í hesum sambandi hevur verið tørvur á meiri løgfrøðiligari ráðgeving enn undanfarnu árini

Konto 3664: tað er ikki týdningarmiki, at skilja ímillum ”Web-hotel og domeni” og edv skipanir annars – ein partur av edv skipanunum, sosum spurnakanning, liggur á web-hotellinum. Tískil verður web-hotel og domeni bókað í 3604

| | **Beinleiðis útreiðslur (viðurløg)** | | |
|---|---|---|---|
| 1350 | Útg. nýtslugjøld undir MMR | 384.902,71 | 213.614,54 |
| 1351 | Útg. nýtslugjøld frá Kommununum | 816.002,10 | 596.191,99 |
| 1352 | Útg. nýtslugjøld frá Kringvarp Føroya | 352.356,30 | 198.849,31 |
| | **Beinleiðis útreiðslur samantalt** | **1.553.261,11** | **1.008.655,84** |

# Umsiting 2023

| Umsitingarútreiðslur | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|
| Starvsfólkaútreiðslur samantaldar | 849.662,99 | 676.025,84 | 582.422,11 |
| Ferðing og marknaðarførsla samantalt | 114.367,05 | 92.224,87 | 10.889,30 |
| Hølisútreiðslur samantaldar | 13.026,00 | 12.960,00 | 12.837,50 |
| Umsitingarútreiðslur samantaldar | 120.804,53 | 104.362,36 | 108.142,48 |
| Rentuútreiðslur samantaldar | 0,00 | 25.802,10 | 31.749,13 |
| **Samantalt** | **1.097.860,57** | **911.375,17** | **746.040,52** |
| | | | |
| **Sett av til umsiting (fast umsitingargjald)** | | | |
| 10 % umsiting frá KVF | 31.373,79 | 26.870,26 | 37.644,88 |
| 20 % av 2014-17 pengum frá MMR, tá ið teir eru fyrndi | 0,00 | 0,00 | 26.666,60 |
| **Samantalt** | **31.373,79** | **26.870,26** | **64.311,48** |
| | | | |
| **Eftir í umsitingargjald til kommunurnar og MMR** | 1.066.486,78 | 884.504,91 | 681.729,04 |
| | | | |
| **Innkomi frá avtalum, ið umsiting skal roknast fyri** | | | |
| Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 1.039.224,55 | 900.987,80 | 1.063.425,70 |
| Kommunurnar | 1.450.200,00 | 1.436.800,00 | 1.396.200,00 |
| Barnabati | 0,00 | 0,00 | 150,00 |
| **Samantalt** | **2.489.424,55** | **2.337.787,80** | **2.459.775,70** |
| | | | |
| **Umsitingargjald í prosentum** | **42,84** | **37,84** | **27,72** |
| | | | |
| Umsitingargjald í krónum frá avtalu | | | |
| Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 445.211,02 | 340.889,85 | 294.729,39 |
| Kommunurnar | 621.275,76 | 543.615,06 | 386.958,08 |
| Barnabati | 0,00 | 0,00 | 41,57 |
| | | | |
| At gjalda rættindahavum (før. og útl.) eftir avtalu | | | |
| Uttanríkis- og Mentamálaráðið | 594.013,53 | 560.097,95 | 768.696,31 |
| Kommunurnar | 828.924,24 | 893.184,94 | 1.009.241,92 |
| Barnabati | 0,00 | 0,00 | 108,43 |

# Fíggjarætlan 2024

| Nr. | RAKSTRARROKNSKAPUR | FÆ 2024 | 2023 | FÆ 2023 | 2022 | FÆ 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | | | | | |
| 1040 | Inntøka sambært avtalu MMR | -1.200.000,00 | -1.039.224,55 | -1.000.000 | -900.987,80 | -1.000.000 | -1.063.425,70 |
| 1041 | Inntøka sambært avtalu Kommunar | -1.600.000,00 | -1.450.200,00 | -1.500.000 | -1.436.800,00 | -1.400.000 | -1.396.200,00 |
| 1042 | Inntøka sambært avtalu Kvf | -400.000,00 | -313.737,86 | -300.000 | -268.702,61 | -375.000 | -414.097,39 |
| 1043 | Inntøka frá stovnum | -100.000,00 | 0,00 | -150 | 0,00 | -150 | -150,00 |
| | **Inntøkur íalt** | **-3.300.000** | **-2.803.162** | **-2.800.150** | **-2.606.490,41** | **-2.775.150** | **-2.873.873,09** |
| | **Beinleiðis útreiðslur (viðurløg)** | | | | | | |
| 1350 | Útg. nýtslugjøld undir MMR | 500.000,00 | 384.902,71 | 300.000 | 213.614,54 | 600.000 | 332.901,51 |
| 1351 | Útg. nýtslugjøld frá Kommununum | 1.200.000,00 | 816.002,10 | 800.000 | 596.191,99 | 800.000 | 854.228,47 |
| 1352 | Útg. nýtslugjøld frá Kringvarp Føroya | 350.000,00 | 352.356,30 | 300.000 | 198.849,31 | 300.000 | 345.991,83 |
| 1353 | Útg. nýtslugjøld frá stovnum | 50000 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **Beinleiðis útreiðslur samantalt** | **2.050.000** | **1.553.261** | **1.400.000** | **1.008.655,84** | **1.700.000** | **1.533.121,81** |
| | **Umsitingarútreiðslur** | | | | | | |
| 2210 | Lønir | 800.000,00 | 742.407,50 | 660.000 | 606.902,54 | 550.000 | 519.779,03 |
| 2211 | Frítíðalønir | 13.000,00 | 11.136,23 | 14.000 | 13.160,37 | 9.000 | 8.844,01 |
| 2213 | Nevndarsamsýning | 50.000,00 | 38.613,12 | 25.000 | 28.379,52 | 25.000 | 19.448,78 |
| 2222 | ArbeiðsMarknaðarEftirlønarGrunnurin | 25.000,00 | 21.449,00 | 25.000 | 17.791,00 | 20.000 | 17.018,00 |
| 2223 | Arbeiðsloysisskipanin | 10.000,00 | 6.794,00 | 8.000 | 3.677,00 | 6.500 | 5.868,00 |
| 2224 | Barsilsgrunnurin | 8.000,00 | 6.846,00 | 8.000 | 5.674,00 | 6.000 | 5.312,00 |
| 2230 | KM-peningur | 0,00 | 264,96 | 0 | 0,00 | 0 | 0,00 |
| 2241 | Starvsfólkakostn./útbúgv. vm | 5.000,00 | 22.152,18 | 0 | 441,41 | 10.000 | 6.152,29 |
| 2750 | Matstovu/umboðan | 5.000,00 | 3.147,50 | 10.000 | 9.007,65 | 13.000 | 1.919,30 |
| 2754 | Gávur og blómar | 2.000,00 | 2.097,95 | 1.000 | 2.250,00 | 1.000 | 1.512,00 |
| 2770 | Ferðing og umboðan | 75.000,00 | 100.334,10 | 50.000 | 65.127,52 | 50.000 | 0,00 |
| 2800 | Kunning, marknaðarføring & rættlestur | 12.000,00 | 8.787,50 | 10.000 | 15.839,70 | 10.000 | 7.458,00 |
| 2811 | Tiltøk | 5.000,00 | 0,00 | 5.000 | 0,00 | 10.000 | 0,00 |
| 3411 | Húsaleiga | 13.200,00 | 13.026,60 | 13.000 | 12.960,33 | 13.000 | 12.837,50 |
| 3600 | Skrivstovu útr. pappír vm | 3.500,00 | 3.385,00 | 2.000 | 3.305,90 | 2.000 | 2.468,58 |
| 3604 | Edv og skipanir | 20.000,00 | 19.278,74 | 18.000 | 16.842,88 | 18.000 | 15.735,90 |
| 3617 | Smærri innkeyp (teldu, printari vm) | 10.000,00 | 7.647,80 | 10.000 | 26.336,11 | 5.000 | 0,00 |
| 3620 | Telefon | 6.000,00 | 6.404,75 | 4.000 | 3.575,35 | 4.000 | 3.735,50 |
| 3628 | Bankakostnaðir | 3.000,00 | 2.543,00 | 3.000 | 2.085,98 | 3.000 | 2.532,00 |
| 3640 | Grannskoðari | 10.000,00 | 10.000,00 | 8.000 | 7.500,00 | 8.000 | 7.500,00 |
| 3645 | Advokatur | 50.000,00 | 37.187,50 | 40.000 | 12.500,00 | 40.000 | 25.000,00 |
| 3647 | Bókhald | 28.000,00 | 26.400,00 | 30.000 | 25.920,00 | 30.000 | 25.680,00 |
| 3661 | Yrkisbókmentir | 0,00 | 1.638,00 | 0 | 0,00 | 2.000 | 994,36 |
| 3663 | Limagjald IFRRO | 6.500,00 | 6.319,74 | 6.500 | 6.296,14 | 6.500 | 6.296,14 |
| 3664 | Web-hotel og domæni | 0,00 | 0,00 | 0 | 0,00 | 0 | 0,00 |
| 3720 | Tap av skuldarum | 0,00 | 0,00 | 0 | 0,00 | 0 | 18.200,00 |
| 4410 | Rentuútreiðslur, banki | 0,00 | 0,00 | 25.000 | 25.802,10 | 23.000 | 31.749,13 |
| | **Útreiðslur samantalt** | 1.160.200 | 1.097.861 | 975.500 | **911.375,50** | 865.000 | **746.040,52** |
| | Rakstrarúrslit | -2.139.800,00 | -1.705.301,24 | | -1.695.114,91 | | -2.127.832,57 |
| | Umsitingarpartur í % | 35,16 | 39,17 | 34,84 | 34,97 | 31,17 | 25,96 |

# Val 2023

Av sitandi stjórn, stillaðu Helle Thede Johansen, Niels Jákup Thomsen og Steintór Rasmussen uppaftur og vórðu afturvald. Sum varalimir vórðu valdir Beinir Bergsson og Jonhard Mikkelsen. Ole Wich stillaði uppaftur sum formaður í umboðsráðnum, og Kim Simonsen stillaði uppaftur sum næstformaður. Báðir vórðu afturvaldir

### Stjórnin

**Helle Thede Johansen**
forfólk

**Steintór Rasmussen**
næstforfólk

**Niels Jákup Thomsen**
skrivari

**Jonhard Mikkelsen**
varalimur

**Beinir Bergsson**
varalimur

### Umboðsráðið

**Ole Wich**
formaður

**Kim Simonsen**
næstformaður

**Jørgen Lützen**
umboðsráðslimur

**Kristian Blak**
umboðsráðslimur

**Jón Brian Hvidtfeldt**
umboðsráðslimur

**Jonhard Mikkelsen**
umboðsráðslimur

### Limafeløg

**Føroysk myndlistafólk**

**Rithøvundafelag Føroya**

**Føroyskir yrkisfotografar**

**Føroysk tónaskøld**

**Føroysk miðlafólk**

**Føroysk bókaforløg**

### Grannskoðari

**Január**
Løggilt grannskoðanarvirki

- tryggjar burðardyggu listaringrásina

**Fjølrit** • postsmoga 62 • FO-110 Tórshavn
www.fjoelrit.fo • tel + 298 238600 og 238601
post@fjoelrit.fo • v-tal 429198

**Útgevari:** Fjølrit
**Myndir:** Fjølrit og Helle Thede Johansen
**Sniðgivið og sett upp:** Heidi Durhuus, Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð og Helle Thede Johansen
**Útgávuár:** 2024

Endurnýtsla úr blaðnum er bert loyvt við skrivligum loyvi